Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



høvdu ein stóran keypara gjøgnum fleiri ættarlið, eisini tað nógva av mínari tíð. Tað var Mortensen á Tvøroyri. Eisini var tað AT á Tvøroyri ta tíð, hetta vardi.

Teir, sum keyptu, komu vanliga sjálvir eftir kjøtinum við egnum báti.

## Skinsapylsa

Seyðurin varð allur slaktaður í Dímun. Men vit royndu at sleppa av við kjøtið so skjótt sum møguligt. Kjøt varð sjálvsagt eisini hongt upp at turka.

Her var eisini nógvur innvølur. Mørur og lundir blivu saltað til vetrarføði. Vit gjørdu nógva blóðpylsu, so gjørdi vit eisini nakað úr blóði, sum kallaðist skinsapylsa. Har kom einki søtt í. Men feit skuldu hon vera. So har skuldu nógv tálg í. Hana kundu vit goyma í hjallinum í minst tveir mánaðir eftir, at pylsan var kókað. Hon skuldi bara hitast upp. Tá ið mamma var í vælmaktini, plagdu vit at slakta gott 200 seyðir.

Men nú er talið 3-400.

Tað komu altíð fólk út til at ganga á fjall. Áðrenn telefonin kom bar sjálvsagt ikki til at geva fjallboð. Men tað var ein standandi avtala, at menninir komu, tá ið líkindini vóru, tá tíðin var komin at fara á fjall. Mest komu teir úr Skúvoy. Hetta var eisini hampuliga høgligt. Tað vóru bert 50 minuttir at sigla. Tað eru 2 fjórðingar millum oyggjarnar.

Tað hava eisini verið vanlukkur í samband við fjallgongu. Á heysti 1884 vóru froðbingar komnir út til Dímunar eftir seyði. Tað var kyrt, tá ið teir komu. Tveir menn vóru eftir á bátinum, meðan hinir fóru til menninar, sum vóru í ferð við at reka. Men tá fór at øtla veðrið, og tað fór at brima. Menninir fóru í skundi oman á Gjónna at vera hinum til hjálpar. Teir fingu eisini bátin upp á helluna, men tá tók eitt óløgi bátin út á Gjónna og holvdi hann. Báðir menninir í bátinum druknaðu.

Teir eru jarðaðir í Dímun. Tann eldri æt Christian Ludvig. Tann yngri kallaðist Frederik Christian Aagaard Skaarup. Hann gjørdist bert 19 ára gamal.

## Ullin fingin til høldar

Ullin varð øll fingin til høldar. Skinnini lógu, til ullin var rotað burtur av. Tey vóru millum annað brúkt til rotuskógvar, og tann rotaða ullin varð nýtt til bátsmanstroyggjur. Øll ullin varð spunnin. Allar troyggjurnar vóru seldar til handlar um landið.

Hjá mammu var tað soleiðis, at Filippus, pápi hennara, var handilsmaður í Skúgvi. Hann byrjaði nokkso tíðliga at handla, tað var vist fyri teir hjá Thomsen á Tvøroyri. Tað vóru tveir handlar í Skúgvi, hin handlaði fyri Mortensen. Seinni fór abbi at handla fyri seg sjálvan. Abbi keypti eisini fisk, sum tað tá var vanligt hjá handilsmonnum.

Ta handilsvøru, sum mamma brúkti, var frá abba. So seldi hann eisini troyggjur fyri hana. Tað varð spunnið og bundið allan samlaðan veturin. So tað var einki við at keða seg.

Tá ið tær bundu bátsmanstroyggjur um hesa tíðina vóru tær



*Hendan myndin er frá seinast í 1920-unum. **Í aftara rað eru f.v.:** Carl Johan Bech, djóralækni, Johannes í Malthúsi í Dali, ókendur, brøðurnir Martin, Gunnar og Óli Jákup í Toft, fosturpápi Janus, Edvard hjá Atu. **Fremra rað:** Katrina, ommusystir Janus, Anna í Malthúsi, Hansina, mamma Janus og Hans í Malthúsi, sum seinni druknaði í gjónni, sum áður er greitt frá. Hann var sonur Johannes. **Fremstur er** Janus*

altíð tvær um hvønn bulin. Tær sótu yvir av hvørji aðrari. So vítt eg minnist fingu tær millum fýra og fimm krónur fyri eina troyggju. Hetta var nakað tá og munaði til húsarhaldið.

Várullin varð eisini øll brúkt til klæðir, buksur, undirbuksur, undirtroyggjur, alt var føroysk klæði, sum vórðu nýtt.

## Torv

Torv var nógv av, bæði nógv og gott. Tað var kolsvart næstan sum kol. Men torv var bara uppi á oynni, heilt uppi á slættanum. Við húsini er bert mold fleiri manshæddir niður.

Tá farið varð eftir torvi tók tað eini trý korter, til ein var aftur. Tað var ikki so galið. Tað var nógva aðra staðni longri at ganga enn tað. Men tað var nakað tungt at koma niðan.

Eg fekk so gjørt ein rennistrong oman til hús. Rennistrongurin var 500 metur langur, og hann kom beint oman í hjallin. Torvið varð koyrt í smáar sekkir, 50 pund. Hetta var sum rímiligt er ein stórur lætti, tí hetta spardi tunga bering.

## Garðurin

Sjálvur hevur greinskrivarin bert verið á Stóru Dímun ein tíma millum tvær tyrluferðir í samband við hesa greinarøð. Steðgurin var stuttur men gav sjálvsagt hug eftir at fáa meira av tíð eina aðru ferð.

Men her skal verða greitt eitt sindur frá garðinum. Tað eru tvær lonir hvør 62 alin langar. Onnur er hoyløða og hin er sethús og fjós. Millum lonirnar er eitt hellulangt tún, 4-5 alin breitt, og fyri báðum endunum er ein veggur við einum portri í. Hetta túnið er rætt, tá ið farið verður á fjall. Har umframt eru fleiri úthús.

Pápi bygdi húsini av nýggjum, tá ið hann tók við í 1920. Húsini hann bygdi vóru 12x14 alin.

Upprunaliga búðu øll saman bæði húsfólk og tænastufólk, tað bar væl til.

Nú eru so tvær íbúðir til tær tvær familjurnar, sum búgva á oynni. Eva og Jógvan Jón við teirra børnum búgva í størru íbúðini. Janus, beiggi hennara, og Erla búgva í hinari. Tey bæði eru júst komin til Dímunar fyribils fyri eitt ár. Tað er hugaligt fyri framtíðina hjá Dímun, at yngra ættarliðið hevur hug til at



*Túnið millum lonirnar, sum verður nýtt sum rætt. Høgligari kann tað ikki vera*



*Drátturin í Stóru Dímun. Hetta var kranin, sum varð nýttur at fáa vøru upp á oynna. Fyrstu árini var hálað við mannamegi. Tey seinnu vórðu ross brúkt*

**Komandi partur**

Á onkrum øki var Dímun fremri enn onnur, og tað var við ravmagni. Framvegis verður greitt frá gerandisdegnum í Dímun. Blaðið kemur ikki út ólavsøkuaftan. Tí verður komandi Miðvika um 14 dagar